

## Nyrup fyri Ritt

Síðani Ritt Bjerregaard fyrradagin boðaði frá, at hon ætlar sær ikki at halda fram sum yvirborgarstjóri í Keypmannahavn, tá hennara embætisskeið rennur út á nýggjárinum, hevur dúgliga verið gitt, hvønn sosialdemokratarnir fara at stilla upp í nhennara stað á valinum í heyst. Eitt av boðunum er fyrrverandi forsætisráðharrin Poul Nyrup Rasmussen. Hann er í løtuni í Evropatinginum, men summir sosialdemokratiskir leiðarar í Keypmannahavn vilja hava hann at royna seg, tí sum fyrrverandi forsætisráðharri verður hann mettur sum eitt sterkt valevni, skrivar Ritzau.

## Dylja egin viðurskifti

Tað gongst illa hjá Fólkatinginum at fáa tinglimirnar at leggja fram upplýsingar um síni fíggjarligu áhugamál. Í fjør løgdu 147 av teimum 179 tinglimunum upplýsingar um síni fíggjarligu áhugamál fram, men í ár eru tað bara 136, skrivar Ritzau. Tað er ikki álagt tinglimum at lata upplýsingar um teirra fíggjarligu áhugamál, tí skipanin er sjálvboðin. Summir tinglimir sýta beinleiðis fyri at gera tað av prinsipiellum orsøkum, og aðrir siga, at teir hava ikki havt tíð enn.

# Regin vil hava forfjónaðu stavirnar í føroyska alfabetið

**Forfjónaðu føroysku bókstavarnir C,Q,W,X og Z eru nú fyri fyrstu ferð komnir út á plátu**

STAVSETING
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Í Havnini koyrir ein bláur Mitsubishi Pajero jeepur við eini heldur sjáldsamari nummarplátu. Á nummarplátuni stendur rætt og slætt »CQWXZ«.

Væl vitandi at við at gjalda eitt sindur eyka ber til at fáa sær eina ynskiplátu, men hví júst hesa samanseting. Tað vísti seg, at hetta var jeepurin hjá Regin Eikhólm, tannlækna í Havn.

- Hetta er ein amnesti pláta fyri forfjónaðar og forfylgdar bókstavar í føroyska alfabetinum, og her verða teir standandi, inntil teir hvør sær aftur eru at finna í føroyska alfabetinum, har teir natúrliga hoyra heima, sigur Regin Eikhólm, avgjørdur, tá vit spyrja um hesa sjáldsomu nummarplátu.

Tað føroyska alfabetið kemur tá at síggja nakað soleiðis út:

**A Á B C D E F G H I Í J K L M N O Ó P Q R S T U Ú V W X Y Ý Z Æ Ø Ð**

- Tað gevur onga meining at útihýsa nøkrum bókstavum, sum vit øll brúka dagliga. Málfelagið hevur í mong ár arbeitt fyri at betra umstøðurnar hjá føroyska móðurmálinum – bæði í skrivt og talu, og tað gongur tann rætta vegin. Tað eru alt fleiri føroyingar – bæði burturi sum heima – ið ynskja, at tað nú verður loyst upp fyri tí spennitroyggju, føroyska málið hevur verið latið í, soleiðis at móðurmálið verður vongurin sum ber flogið, sigur Regin Eikhólk.

Hann sigur, at hetta krevur fyrst og fremst, at vit hava eitt nøktandi alfabet ella ein bóstavabasis sum omanfyri standandi, og tí vóna tey í Málfelagnum, at Mentamálaráðið fer at taka hetta upp í næstum.

- Tað hevði helst frøtt V. U. Hammershaimb á hansara 190 ára føðingardegi 25. mars, at tað finst eitt aktivt Málfelag her í Føroyum, ið stríðist fyri at geva føroyska móðurmálinum alheims flog - ikki við læntum ella puristiskum fjarðum, men við basis í tí unikka móðurmálsliga svanaflogi, vit fingu frá móðurbarmi, og sum vit øll eru ábyrgdarar av, sigur Regin Eikhólm.




*Jeepurin við teirri serstøku nummarplátuni – og Regin Eikhólm, sum stríðist fyri at vinna forfjónaðu bókstavunum innivist aftur í føroyska stavraðnum*
Mynd: Jens Kristian Vang

# So fekk Ísland tær 300 milliónirnar

**Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum, og íslenski fíggjarmálaráðharrin Steingrímur J. Sigfusson undirskrivðu endaligu lániavtaluna millum Føroya Landsstýri og íslendsku stjórnina mánadagin**

BÚSKAPUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Avtalan veitir íslendsku stjórnini 300 milliónir krónur í láni frá føroyska landskassanum. Steingrímur J. Sigfusson, íslendski fíggjarmálaráðharrin, var sera fegin um avtaluna. Hóast 300 milliónir krónur ikki endurreisa íslendska búskapin, so helt hann hetta vera eitt sera tíðandi stig á leiðini.



*Steingrímur J. Sigfússon og Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharrar í Íslandi og Føroyum, skriva undir avtaluna um 300 milliónа lánið til Ísland*

- Um hini norðurlondini gera tað sama – og eisini Pólland og Russland, so hava vit nóg mikið av pengum at endurreisa búskapin, segði Steingrímur J. Sigfusson.

Lánið er veitt sum stuðul til búskaparætlanina hjá íslendsku stjórnini. Ein ætlan, sum hevur til endamáls at fáa javnvág aftur í íslendska búskapin eftir fíggjarkreppuna, sum rakti landið seinasta heyst. Føroyska lánið skal styrkja gjaldoyrisgoymslur Íslands.

Lánið úr Føroyum er langfreistað og hevur lagarligar treytir.

Hetta er fyrsta lánið til Ísland av hesum slagi. Altjóða Gjaldsoyrisgrunnurin, IMF, hevur játtað eitt lán upp á 2.100 milliónir dollarar. Harafturat hava hini Norðurlondini – Danmark, Finland, Noreg og Svøríki – givið lyfti um gjaldsoyralán til Íslands upp á í alt 2.500 milliónir dollarar. Íslendska stjórnin er í samráðingum við hesi lond um lánstreytir. Samráðingar eru eisini við Pólland og Russland um sama slag av gjaldoyraláni.

Lániavtalan millum Føroyar og Ísland var undirskrivað í Fíggjarmálaráðnum av Jóannes Eidesgaard, landsstýrismanni í fíggjarmálum og Steingrími J. Sigfússyni, fíggjarmálaráðharra.

Á arbeiðsvitjanini hjá íslendska fíggjarmálaráðharranum vóru eisini Svein Harald Øygard, stjóri í Seðlabankanum, Jón Sigurðsson, formaður í samráðingarnevnd Íslands um gjaldoyralán og Sturli Pállson, forstjóri í atltjóðadeild Seðlabankans.